LM-143/2020

almannaverkið

Lýsing av avleiðingum av verkfalli við manglandi undantøkum 14. juni 2021

Almannaverkið hevur søkt um undantak frá verkfallinum til niðanfyri standandi tænastur. Almannaverkið metir tað vera neyðugt at manna niðanfyri standandi øki, tí talan er um tænastur, sum eru lívsneyðugar ella sum av øðrum orsøkum ikki kunnu bíða, uttan at vandi er fyri lívi og heilsu ella varandi skaða.

Ásetta starvsfólkaorkan niðanfyri er tann, sum Almannaverkið metir skal til fyri at kunna veita ta mest grundleggjandi tænastuna. Tað vil siga ikki til námsfrøðiligt menningararbeiði, men fyri at fáa nøkta grundleggjandi tørvin í gerandisdegnum. Í umbønini um undantøk, sum Almannaverkið metir vera neyðug, er hædd tikin fyri tænastumonnum og øðrum fakbólkum, sum ikki eru í verkfalli.

Talan er um samdøgurstilboð sambært barnaverndarlógini og bú- og stuðulsfyriskipanir sambært lóg um almannatrygd og tænastur.

Yvirlit yvir tal av starvsfólkum, sum undantøk verður søkt um, býtt á leiðslu og eindir við svari frá pedagogfelagnum 13. juni 2021:

Eind	Starvsfólk	Svar
Leiðsla	6	Ikki gingið á møti
1	7	Ikki gingið á møti
2	6	Ikki gingið á møti
3	7	Ikki gingið á møti
4	9	Ikki gingið á møti
5	7	Ikki gingið á møti
6	9	Ikki gingið á møti
7	20	Ikki gingið á møti
8	17	Undantak latið til 2 starvsfólk í stuðulskipan seinheilaskaða
9	0	Ikki gingið á møti
10	30	Ikki gingið á møti
11	4	Ikki gingið á møti
12	3	Ikki gingið á møti
Ialt	**125**	Ikki gingið á møti

Hetta er umframt tey undantøk, sum eru givin.

Grundarlagið fyri metingini
Grundarlagið fyri metingunum er støðan í dag, og at tíðarskeiðið ein arbeiðssteðgur fevnir um, er umleið 5 dagar. Er talan um longri tíðarskeið, kann tørvurin á undantøkum verða størri á ávísum stovnum og í ávísum fyriskipanum. Fyrivarni má eisini takast fyri møguligum broytingum í tænastum, borgaraskaranum, sum móttekur hesar tænastur, og í starvsfólkahópinum.

Førleiki og ábyrgd at meta
Tað hevur stóran týdning, at samband áhaldandi verður hildið við borgarar, sum ikki fáa tænastur meðan arbeiðssteðgur er, soleiðis at metast kann um støðuna so hvørt, og at ein møgulig neyðtilbúgving verður sett í verk, har tað verður neyðugt. Undir einum møguligum arbeiðssteðgi, eru tað avvarðandi eindarleiðarir og leiðarir, sum best kunnu gera skikkaðar metingar hesum viðvíkjandi. Hetta snýr seg í fystu atløgu ikki um, at vandi er fyri lív og heilsu hjá borgarunum, men at tryggja at vandi ikki verður fyri lív og heilsu hjá borgarunum, í einum tíðarskeiði við arbeiðssteðgi. Atlit má somuleiðis takast til, at nógvir borgarar eru knýttir at einstøkum starvsfólkum, og ráðiligt er ikki at seta nýggj starvsfólk inn.

Virksemi, sum verður niðurlagt, tí vandi ikki er fyri lív og heilsu
Virksemi á stovnum og fyriskipanum, har vandi ikki er fyri lív ella heilsu hjá borgarum, verður niðurlagt. Tað snýr seg í høvuðsheitum um verkstøð, virknistilboð, frítíðartilboð, stuðulstoymi og veristøð, og um flestu umlættingartilboð og búfelagsskapir. Undantøk verða ikki umbiðin á hesum stovnum og fyriskipanum, eins og undantøk heldur ikki verða umbiðin á stovnum og fyriskipanum, har nóg nógv starvsfólk eru tænastumenn og/ella fevnd av øðrum sáttmálum, so tað kann lata seg gera at hava eitt virksemi uttan undantøk.

Avleiðingar fyri borgarar, starvsfólk og avvarðandi
Niðanfyri er ein samlað lýsing av teimum avleiðingum, sum verkfallið fær, verða neyðug undantøk ikki latin.

Yvirlitið vísir tað virksemi, søkt er um undantak til, og ta ítøkiligu grundgeving, sum Almannaverkið hevur nýtt í hvørjum einstøkum føri. Tí eru nakrar endurtøkur, har virksemi líkist og somu atlit gera seg galdandi. Yvirlitið er bólkað er eftir slagi av fyriskipan og tørvi, og neyðugt er at lýsa støð og avleiðingar yvirskipað við atliti til tagnarskyldu og virðingina fyri tí einstaka. Av somu orsøk eru heldur ikki allar umsóknir um undantak endurgivin.

Tær avleiðingar, sum verða lýstar niðanfyri, fevna um tilsamans **211 borgarar**.

Tænasta og tørvur	**Avleiðing fyri borgaran**
Borgarar við autismu, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri stórum afturstigum í viðgerðini, sum millum annað økir vandan fyri álvarsligum harðskapstøðum.	Stovnurin letur aftur í morgin kl. 07.00 og borgarar mugu heim til avvarðandi móti egnum ynski og ynski hjá avvarðandi.
Borgarar við menningartarni og øðrum brekum, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	Eindarleiðarin kemur inn tvær ferðir dagliga at geva heilivág, máltíðir og annað.
Borgarar við menningartarni og øðrum brekum, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu. Vandi er eisini fyri misnýtslu og harðskapi.	Bert eitt starvsfólk er til arbeiðis í senn. Tað førir við sær, at ómobilir borgarar verða útsettir fyri ótryggum støðum og órøkt.
Borgarar við menningartarni, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri misstrivna og afturstigum.	2 borgarar fara heim. Hesir borgarar hava búð á stovni alt sítt ungdóms- og vaksnalív. Ringt er at siga um avleiðingar, men matur og heilivágur verður ein trupuleiki. Her er ikki vandi fyri harðskapi og sjálvskaðan, men eitt slag av vanrøkt kann sigast. Fyribils loysnin er kunning og innkeyp fyri borgararnar. Komandi dagarnar skipar leiðslan fyri, at matur og heilvágur verður givin.

Borgarar við menningartarni og autismu, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	Fleiri búfólk verða illa fyri sálarliga.
Borgarar við menningartarni, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu	Búfólkini mugu úr sínum egna heimi til avvarðandi at búgva. Tað kann hava álvarsamar avleiðingar fyri tvey av búfólkunum. Hetta kemst av, at avvarðandi hjá búfólkunum ikki megna at hava tey hjá sær í longri tíð. Hetta kann enda við ógvuliga strongdum búfólkum, sum síðan kunnu fremja bæði sálarligan og fysiskan harðskap.
Borgarar við menningartarni, sálarsjúku og øðrum brekum, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	Vandi er fyri ógvusligum harðskapi, viðkomandi rýmir, er í vanda fyri seg og onnur. Neyðugt er umleggja til døgnvaktir á 24 t, har starvsfólk eru til arbeiðis annað hvørt døgn.
Borgarar við menningartarni og øðrum brekum, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	Her eru fleiri borgarar, sum ikki megna at koma upp úr songini, fara á WC, fáa sær at eta ella taka lívsneyðugan heilivág. Ein borgari er til stóran vanda fyri onnur. Her stendur um lív, um ikki starvsfólk eru til staðar.
Borgarar við menningartarni, sálarsjúku og øðrum brekum, sum ikki kunnu vera einsamallir uttan at vandi er fyri lív og heilsu. Vandi er eisini fyri harðskapi og sjálvskaðan.	Vandi er fyri harðskapi og sjálvskaðan/sjálvsmorðsroyndir.
Borgarar við fjølbreki og menningartarni, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu. Tann eini borgari hevur einstaklingafyriskipan.	Skema verður mannað í tveir dagar. Eftir tveir dagar er neyðugt at senda borgarar heim móti teirra ynski; ein av hesum hevur tørv á 24 tímars uppsýn og er í álvarsamum lívsvanda.
Borgari við menningartarni, sum ikki kann vera einsamallur, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	At vera einsamallur við borgaranum er vandamikið, tí viðkomandi skapar nógvar harskapsstøður. Avleiðingin er sera álvarsom í mun til rættindi og røkt hjá borgaranum.
Borgarar við seinheilaskaða, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	Ein óhjálpin, ómobilur og málleysur borgari verður sendur heim og fær onga tænastu.
Barnaverndarstovnar o.a.	Børn, sum eru umsorgarnaryvirtikin, verða send heim og fáa ikki ta viðgerð, sum er neyðug. Neyðugt verður at lata ein stovn aftur og annað virksemi má leggjast saman. Valt er ikki at lýsa tær sera álvarsomu avleiðingar fyri børnini út í æsir av atliti til anonymitet hjá einstaka barninum. Í stuttum kann sigast, at hetta eigur undir ongum umstøðum at koma fyri.

Borgarar við menningartarni, og sálarligum trupulleikum, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu. Eisini er vandi fyri harðskapi og sjálvskaðan.	Eitt starvsfólk er til arbeiðis. Tað menniskjaligt ógjørligt at lyfta hesa uppgávu einsamallur. Borgararnir megna ikki sjálvkontrol, persónligt reinføri, at fáa sær at eta, lata seg í klæði, at skyna á og vita um umstøður eru tryggar ella vandamiklar, at leita sær hjálp ella at finna loysnir uppá gerandis avbjóðingar. Hesi viðurskiftini hava stóran vandan við sær fyri harðligan atburð millum borgarar.
Borgarar við sálarsjúku, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu, og at heilivágur ikki verður tikin.	Tað viðførir ótta, elvir til depressiónir, vreingjan av veruleika, at hoyra røddir o. l. sum aftur kann føra til sínámillum harðskap. Hesi fólk eru ikki før fyri at taka ábyrgd av egnum lívi og gerðum, ella avleiðingum sum standast av hesum.
Borgarar við sálarsjúku og umsorganarsviki. Borgararnir kunnu ikki vera einsamallir uttan at vandi er fyri missbrúki og at lívsneyðugur heilivágur ikki verður tikin.	Stórur vandi er fyri ovurnýtslu av rúsevnum, hørðum rúsevnum og harðskapi. Somuleiðis er ein borgari sum er sjálvmorðshóttur. Tað verður ikki gjørligt at hava starvsfólk á stovninum ávist tíðarskeið.
Borgarar við sálarsjúku, sum ikki kunnu vera einsamallir, uttan at vandi er fyri lív og heilsu.	2 av 8 borgarum fara heim til familju. Um onkur borgari fær eina psykosu, og eingin náttarvakt er at geva heilivág, verður avleiðingin, at borgarin fær eina óforútsigiliga atferð. Vandi er eisini fyri, at eldur kemur í húsini.
Borgarar við sálarsjúku sum eru til vanda fyri sær sjálvum og øðrum. Eisini er øktur vandi fyri harðskapi millum borgara/borgara – borgara/starvsfólki.	Vandi fyri sjálvmorðsroyndum og destruktivari atferð so sum cutting, rúsevna- og alkoholmisnýtslu. Ein borgari við dómi krevur 16 tímar um døgnið. Økttur vandi fyri tørv á innlegging á psykiatriska deplinum.
Eldri og óhjálpnir borgarar, ið hava tørv á hjálp til basala røkt.	Vandi fyri psykosu og harðskapi.
Stuðulsskipan til borgarar við ymiskum avbjóðingum. Neyðugt er at hava eftirlit við nøkrum av hesum borgarum, sum eru illa fyri, fyri at fyribyrgja sjálvmorð og sjálvskaðan.	Fylgirnar av hesum eru: Vit steingja virksemi og borgararnir mugu vera heima.

Almannaverkið 14. juni 2021